

*Finnur Fríði við bryggju í Vestmannaoyggjunum* *Mynd: MKorgunblaðið*

# Til Íslands við svartkjaftinum

**Finnur Fríði landaði 2600 tons av svartkjafti í Vestmannaoyggjunum ígjár, og Fagraberg er á veg til Íslands við 3000 tonsum**

FISKIVINNA

*Árni Joesen*
*arni@sosialurin.fo*

Fyrstu svartkjaftalastirnar í hesum árinum verða lagdar upp í Íslandi. Fyrradagin landaði Finnur Fríði 2.600 tons í Vestmannaoyggjunum, og í er Fagraberg komin til Íslands við 3.000 tonsum.

Finnur Fríði fór út 2. jólakvøld, og eisini Fagraberg fór til fiskiskap millum jól og nýggjár. Bæði skipini hava roynt í føroyskum sjógvi, suður av Munkagrunninum.

Orsøkin til at skipini sigla fram við Føroyum er, at Havsbrún tekur ikki ímóti fiski í løtuni. Síðani fyri jól hava tey havt ketlarnar til høvuðsklassing. Hetta verður gjørt triðja hvørt ár um verður altíð gjørt um hesa tíðina, tí hetta er einasta tíðin, har tað ber til at taka ketlarnar út. Arbeiðið er mett at taka einar tvær vikur, og Havsbrún fer aftur at taka ímóti fiski um miðjan januar, sigur stjórin, Bergur Poulsen, við Sosialin.

## Almennur fundur um brúðardans og brúdleypssiðir

Í annaðkvøld, trettandakvøld, klokkan 20.00 skipar Sláið Ring fyri almennum fundi í Miðlahúsinum. Evnið er brúðardansur og brúdleypssiðir.

Fyri at vekja áhugan fyri brúðardansi og brúðarvísum, skipar Sláið Ring – landsfelag føroyskum dansi at frama, fyri almennum fundi, har Jóan Pauli Joensen, professari, Theodor Eli Olsen, prestur, Magnus Magnussen, borðstýrari til veitslur, Rasmus A. Joensen, formaður í Sláið Ring, koma at leggja fyri og hugleiða.

Eftir innleggini verður høvi hjá fundarluttakarunum at seta spurningar og gera viðmerkingar, bæði til innleggini og til evni sum heild.

Eftir fundin verður farið verður upp á gólv.

Fyrireikararnir rokna við, at tiltakið varar umleið tveir tímar.

Orðsýrari verður Jónleif Johannesen, næstformaður í Sláið Ring.




KUNNING UM
**almannaveitingar 2010**

Broytingar í upphæddum við gildi frá 1. januar 2010.
Fyri 2010 eru veitingarupphæddirnar hesar(1):

**Almannapensjónir o.a.**

| | Kr. árliga | Kr. um mán. |
|---|---|---|
| Grundupphædd til fólkapensjón – støk | 50.028,00 | 4.169 |
| Grundupphædd til fólkapensjón – gift hvør | 39.756,00 | 3.313 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón – støk | 69.852,00 | 5.821 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón – gift hvør | 55.512,00 | 4.626 |
| Viðbót til fólkapensjón – støk | 37.884,00 | 3.157 |
| Viðbót til fólkapensjón – gift hvør | 29.328,00 | 2.444 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón – støk | 69.432,00 | 5.786 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón – gift hvør | 62.688,00 | 5.224 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – støk | 22.536,00 | 1.878 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – gift hvør | 19.584,00 | 1.632 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – støk | 21.276,00 | 1.773 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – gift hvør | 17.088,00 | 1.424 |
| Eyka viðbót til lægstu fyritíðarpensjónistar | 32.904,00 | 2.742 |
| Hjálparviðbót | 34.848,00 | 2.904 |
| Røktarviðbót | 69.552,00 | 5.796 |
| Avlamisviðbót/avlamisveiting | 32.592,00 | 2.716 |
| Frádráttarfrí inntøkupphædd – fólkapensjónistar | 59.800,00 | |
| Frádráttarfrí inntøkupphædd – fyritíðarpensjónistar | 89.700,00 | |

**Uppihald á stovni o.l.**

| | Kr. árliga | Kr. um mán. |
|---|---|---|
| Upphædd til persónligan tørv til persónar 60 ár og eldri | 11.772,00 | 981 |
| Upphædd til persónligan tørv til persónar undir 60 ár | 14.112,00 | 1.176 |
| Gjald fyri umlætting | 128,87 kr. | (um samdøgrið) |

**Viðbót til ávísar pensjónistar v.fl. (brennistudningur)**

| | Kr. árliga | Kr. pr. útgjald |
|---|---|---|
| Upphædd (3 útgjøld um árið) | 7.344,00 | 2.448 |

**Barnagjald og barnaískoyti til einsamallar uppihaldarar**

| | Kr. árliga | Kr. um mán. |
|---|---|---|
| Barnagjald smb. § 5 | 12.552,00 | 1.046 |
| Barnagjald smb. § 15, stk. 1 og 2 | 12.552,00 | 1.046 |
| Økt barnagjald smb. § 15, stk. 3 | 25.104,00 | 2.092 |
| Barnaískoyti smb. § 19a | 6.360,00 | 1.590 um ársfj. |
| Gjald til uppihald tveir mánaðir áðrenn og ein mánað aftaná føðing eftir § 6, stk. 1 | 1.240,36 kr. | (um mán.) |
| Gjald í sambandi við føðing eftir § 6, stk. 1 | 724,88 kr. | (eing. upphædd) |

**Gjald fyri uppihald á eldrasambýli**

| | | |
|---|---|---|
| Gjald fyri umlætting | 128,87 kr. | (um samdøgrið) |
| Gjald fyri uppihald á eldrasambýli støk | 3.558,00 kr. | (um mán.) |
| Gjald fyri uppihald á eldrasambýli hjún | 2.409,00 kr. | (um mán.) |

**Egingjald fyri serlig bútilboð fyri heimleys**

| | | |
|---|---|---|
| Serlig bútilboð fyri heimleys, § 11, stk. 2 | 1.776,00 kr. | (um mán.) |
| Eyka fyri kost í mesta lagi | 1.183,00 kr. | (um mán.) |
| Serlig bútilboð fyri heimleys, § 11, stk. 3 | 2.122,00 kr. | (um mán.) |
| Eyka fyri kost í mesta lagi | 1.183,00 kr. | (um mán.) |

almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

KREA · TEL 60 80 80

(1) Sbr. kunngerð nr. 152 frá 3.12.2010 um áseting om javning av almannaveitingum.